Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 54 - 16. mars 2007

# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Friður um skúlabygging

Tað er væl skiljandi, at ávísir partar í Suðuroy og á tingi eru vónbrotnir av avgerðini um at flyta Miðnámsskúlan í Vági til Hovs. Stríðið um skúlan hevur verið bæði tungt og drúgvt. Hóast skúlin sum stovnur er javngamal við studentaskúlan á Kambsdali, sum fyri mongum árum síðani hevur fingið loyst sín hølistrupulleika, so er at kalla einki hent í Suðuroy á økinum. Men so kom politiska avgerðin um at byggja skúlan í Vági, og nógv um ikki alt var klárt at byggja. Hetta fegnaðust øll um, hóast skúlin lá fjart frá, har teir flestu næmingarnir búðu.

Á Tvøroyri var staðsettur annar skúli, ein yrkisskúli fyri heilsuhjálparar og heilsurøktarar. Hesum skúla vórðu frá fyrsta degi boðin eins vesalig húsakor sum miðnámsskúlanum. Til tað er bert at siga, at hevði avgerðin ikki verið tikin um at flyta hendan skúla úr Havn til Suðuroyar, so hevði hann nú húsast í eins snotiligum og framúr vælhóskandi hølum sum Sjúkrarøktarfrøðiskúlin. Men hetta var tann gamla søgan: ein politisk avgerð um útflyting varð tikin, uttan at avvarandi myndugleikar megnaðu at tryggja útflutta stovninum eitt minstamark av neyðturviligum og hóskandi hølum. Hetta megnaði hvørki fullveldissamgongan ella hendan samgongan.

So varð tikin ein reint politisk avgerð um at flyta Miðnámsskúlan úr Vági til Hovs. Hetta var gamla uppskotið frá áttatiárunum. Hvørt hetta var ein vís og sakliga grundað avgerð, skulu vit ikki meta um her. Men henda avgerð lat so uppfyri eini sømiligari loysn fyri Almanna- og heilsuskúlan. Hesin skúli hevur undir teimum mest primitivu og vánaligast hølisumtøðum, ið hugsast kunnu, klárað at avrika eitt sera dygdargott arbeiði. Næmingarnir eru sera fegnir, og arbeiðsarknaðurin kappast um teir lidnu næmingarnar. Hesin skúli hevur annað og betri uppiborið frá landsins myndugleikum, og henda ótolandi støða kundi ikki halda fram. Hetta verður nú bøtt um við nýggja bygninginum í Hovi. Loysnin fer heilt vist at gagna báðum skúlum og ungdómi í Suðuroy og um alt landið. Nú eigur friður at verða um hesa skúlabygging. Tey, sum ikki hava fingið sín vilja, eiga at viðurkenna hetta, og øll eiga at medvirka til, at málið: tveir skúlar, sum skulu verða millum teir fremstu í heiminum, sleppa at mennast og blóma til gagn fyri okkum øll.

**Sosialurin**

## Frá Føroya Kommunufelag (FKF)

VEGNA FØROYA KOMMUNUFELAG
Rósa Samuelsen,
Forkvinna



**Viðmerking til Kjakið um eina kommunala útjavningarskipan**

Seinastu vikurnar hevur verið dúgliga kjakast um eina útjavningarskipan ímillum kommunur. Hetta kunna vit sum kommunufelag gleðast um, tí hetta er eitt mál sum vit halda er neyðugt at fáa á dagsskrá. Herfyri skrivaði ein av stýrislimum felagsins eitt innlegg í bløðunum, sum eftir øllum at døma er fallið formanninum í KSF fyri hjarta, og nú skýrir hann felagið fyri bæði líkt og ólíkt. Í fyrstu atløgu máa vit staðfesta at ta í FKF er loyvt at hava eina meining sum stýrislimur, men hinvegin merkir ein meining hjá einum stýrislimi ikki at FKF hevur somu meining.

Kommunufeløgini bæði hava eins og flest øll onnur í samfelagnum staðfest at stórur ójavni er ímillum Kommunurnar, bæði tá ið ta snýr seg um inntøkugrundarlag og útreiðslutørv.

Út frá hesum hevur Føroya Kommunufelag mett, at neyðugt er við einari útjavningarskipan, og í minsta lagi at ein slík skipan verður sett á dagsskránna og lýst objektivt bæði við fyrimunum og vansum. Kommunusamskipan Føroya er hinvegin komin til ta niðurstøðu at hóast stóran ójavna so er helst ikki neyðugt við einari útjavningarskipan. Til at undirbyggja sínum sjónarmiðum hevur KSF í loyndum funnið fram til eina útjavningaskipan sum onga útjavning hevur við sær. Og sjálvandi kann eingin taka undir við einari útjavningarskipan uttan útjavning.

Í grein í dimmalætting 15/03 – 2007 við heitinum "Útjavning hóttur kommunala sjálvræði" staðfestir Heðin Mortensen, at KSF als onga støðu hevur tikið í málinum viðvíkjandi útjavning, men at KSF arbeiðir seriøst við at lýsa málið. Men bara við lesa yvirskriftina á greinini, so sæst at KSF hevur tikið støðu í hesum máli. Og innihaldi í sjálvari greini er í veruleikanum ein long, men illa dokumentera, roynd at skýra útjavning sum nyttuleysa.

Síðani kemur Stýrisformaðurin við ymiskum pástandum um Føroya Kommunufelag

At FKF roynir at verja tilveru grundarlagi hjá smáu kommununum tí hóttafallið er eyðsýnt. Hesar skulu nú yvirliva við figgjarligari neyðhjálp frá teimum stóru.

At FKF ynskir eina útjavning ímillum 34 kommunur, fyri at varðveita verandi kommunubygna

At FKF skýggjar eina útreiðsluútjavning

**Til hetta er at siga**

At Sjálvsagt verja vit tilveru grundarlagi hjá okkara limakommunum. Vit eru eitt áhuga felag hjá teimum kommunum sum til eina og hvørja tíð eru limir hjá okkum. Men lat ta vera sagt, at felagið er ikki ímóti størri eindum ella samanleggingum, als ikki. Felagið heldur bert, at ta er upp til tær einstøku kommunurnar og ta fólkið sum har býr, at taka avgerð hesum viðvíkjandi.

At FKF ynskir eina útjavning ímillum 34 kommunur. Enn eitt uppáhald uttan grundgeving. Helst fyri at sløra tann veruleika, at ein útjavnarskipan helst er neyðug líkamikið um vit hava 4, 7 ella 34 kommunur. Talan er um regionalar ójavnar, og vit fáa ikki eina ríka kommunu við at leggja fleiri fátækar saman.

At FKF skal skýggja útreiðsluútjavning - Hetta er ein løgin pástandur og er hann uttan hald í veruleikanum. Sjálvandi má hædd takast fyri at eitt nú nakrar kommunur hava lutfalsliga nógv eldri, lutfalsliga nógv børn, spjadda búseting, trupul samferðslu viðurskifti o.a.

Føroya Kommunufelag hevur sett sær fyri at lýsa bæði fyrimunir og vansar við einari kommunalari útjavningarskipan. Vit hava longu víst á, at stórir fíggjarligir ójavnar eru ímillum kommunurnar ( Sí grein á heimasíðuni www.fkf.fo dagfest 20 feb.), og vit hava innanhýsis gjørt fleiri dømi um hvussu ein útjavningarskipan kundi verið gjørd. Hvussu tann endaliga skipanin skal síggja út er ein politiskur spurningur ið kommunurnar í semju eiga at finna útav.

Arbeiðsháttinum hjá KSF, tykist hinvegin at byrja við úrslitinum, nevniliga at einki skal útjavnast. Síðani verður farið undir at útgreina hvussu komast kann fram til hetta úrslit.

Hetta er eftir okkara tykki ikki nakar munagóður arbeiðsháttur

## Nýtt kirkjuklaver í Miðvági

**Miðvágs Kirkja hevur fyri heilt kortum keypt nýtt klaver. Í hesum sambandi fer ungi klaverleikarin Oluf Dam, sum er miðvingur, at spæla eina konsert í kirkjuni komandi sunnudag**

TÍÐINDASKRIV

Á skránni hjá Oluf Dam er klassikur tónleikur eftir Johann Sebastian Bach, Frederic Chopin og Claude Debussy. Saman við klaverlærara sínum fer hann eisini at spæla tónleik fyri ferhent klaver eftir norska tónaskaldið Edvard Grieg.

Oluf Dam fór undir at spæla klaver 10 ára gamal og lærdi tey fyrstu fimm árini hjá Martini Pollard, sum var klaverleikari og leiðari á musikkskúlanum í Vágum, til hann flutti av landinum í 2005. Síðan hevur hann verið næmingur hjá Jóhannesi Andreasen, sum eisini fer at spæla saman við Olufi sunnudagin.

Í teimum tónleikakappingum uttanlands, sum Oluf hevur tikið lut í, hevur hann staðið seg sera væl og vunnið fleiri virðislønir fyri sítt frálíka klaverspæl.

Øll eru vælkomin til konsertina í Miðvágs Kirkju, sum verður sunnudagin 18. mars, klokkan 16.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.